# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Björn Hagström deyður

Svenska avísin Dagens Nyheter skrivar at Björn Hagström, professari, er deyður 88 ára gamal.

Björn Hagström hevði stóran áhuga fyri norðurlendskum máli, serliga føroyskum.

Við at vitja í Føroyum lærdi hann seg málið og tær ymisku føroysku dialektirnar. Hann savnaði tilfar um føroyska málið til eina doktararitgerð, sum hann vardi í 1967.

Frá 1968 til 1976 var hann lærari og granskari við unversitetið í Stokholm, og frá 1976-77 arbeiddi hann sum professari á Fróðskaparsetrinum í Havn.

Eftir tað hevði hann ábyrgd av eini umfatandi orðabók um tey gomlu norðurlendsku málini, sum var løgd til rættis á universitetinum í Keypmannahavn.

Blaðið skriva at Björn Hagström er fremsti granskarin í føroyska málinum, sum nakrantíð hevur verið í Svøríki.

*- red*



DÖDSFALL

Björn Hagström

Professor Björn Hagström, Stockholm, har avlidit 88 år gammal. Närmaste anhöriga är hustrun Bothild samt döttrarna Torbjörg, Gunvor och Kerstin.

Björn Hagström var född i Stockholm 1921. Efter studentexamen vid Södra latin och värnpliktstjänst-

Avhandlingen, som gav honom docentkompetens i nordiska språk, skrev han vid sidan av lektorstjänst i svenska vid Gubbängens gymnasium.

ÅREN 1968–76 verkade han som lärare och forskare i nordiska språk vid Stockholms universitet, tidvis som professorsvikarie.

## Til minde om min kære søn

# Martin Johnny Johansen

Dagen gryr
Natten flyr
Hvorfor gik du dog bort
Dit liv blev alt for kort
Skal vi mon mødes igen ved himlens port

Gid du var her hos mig
Og jeg ville omfavne dig
Endeløs min kærlighed til dig
Savnet vil altid være her hos mig

Tårer sagte ad mine kinder triller
Åh alle disse minder
Kommer til mig i nattens mørke
Til de hen ad morgen størkne
Når dagen gryr
Og natten flyr



Jeg takker dig fordi du var til
Min kære barn »børnelil«
Jeg husker alle glade stunder
Når jeg sidder her og blunder

Smerten i mit hjerte sidder
Uroen om natten mig stikker
Søvnløs jeg ligger
Dygtig og klog som du var
Får jeg mon nogenside svar

Knust er venner og kammesjukker
For at du nu døren for stedse lukker
Ak ja, min dyrebare du måtte fare
For os efterladte er det ikke til at klare

Jeg ved du er kommer til et bedre sted
Og jeg kunne ikke komme med
Endelig har din sjæl fundet fred
og jeg vil være for evigt ked
Dagen gryr
Natten flyr

**Fra din mor**

Fyri 25 árum síðan:

## Telefonboks á Norðasta Horni

**Sosialurin hósdagin 14. februar 1985:**

Hóast hetta lítla húsið sær út sum eitt nátthús, er talan um eina telefonboks, sum er sett upp á Norðasta Horni, tá fólk byrjaðu at flyta út hagar. Í samráð við eigarafelagið setti Telefonverkið upp eina mynttelefon, meðan bíðað var eftir at telefonlinjurnarvórðu lagdar til økið. Mynttelefonin var einasta telefon har á leið.

*Kelda: Sosialurin 14. februar 1985*



## Andlát og jarðarferðir

**Mikkjal Nielsen** verður kórsettur í Filipskirkjuni, Kastrupvej 57, 2300 Kjøpinhavn S, mikudagin 17. februar klokkan 12.

**Juleif Jacobsen, Tórshavn**, andaðist á Lágargarði hósmorgunin 83 ára gamal. Bønarhald verður á Láargarði mánadagin kl.17. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin kl. 13.

**Hjørdis Mellemgaard, Høje Taastrup, ættað úr Miðvági**, fer til gravar úr Miðvágs kirkju týsdagin 16. februar kl. 13. Tey, ið vilja minnast Hjørdis, kunnu lata krabbameinsfelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá bróðir okkara

**Óli F. Debess**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum vóru um hann seinastu tíðina.
Tøkk tit tykkum, sum bakaðu.
Takk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Systkini**

## Merkisdagar

**80 ára føðingardagur**
28. feb. verður Hildigarð Nattestad, Hvalba, 80 ár. Dagurin verður hildin 20. feb. í gistingarhúsinum í Øravík, kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Hósdagin 4. feb. hava Oda og Árni Frederiksberg, á Strondum, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fíggjakvøldið 19. feb. frá kl. 18 í Kelduni í Skálafirði.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 28. feb. hava Oddvør og Kornelius Johannesen við Gjógv gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum við Gjógv leygardagin 27. feb. frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Sunnudagin 21. feb. giftast Thomas F. Johannessen, Æðuvík, og Ann-Margit Hansen, Saltnes. Opið hús verður í Stóratún 14 frá kl. 18.

**Prógv**
28-01-2010 fekk Liljan Vatnhamar Olsen, Argir, prógv sum professionsbachelor sum pædagog á Professionshøjskole UCC frøbel, Hovedstaden DK

## Dagurin

15. februar, Faustinus, deyður umleið ár 120. Brøðurnir Faustinus og Jovita í Brescia í Norðuritalia vórðu píndir og tiknir av døgum.